# Norðurlendska vælferðarskipanin

Í Føroyum fáa fólk hjálp frá tí almenna, um tørvur er á tí. Hjálpin er fíggjað gjøgnum skattin, sum vit gjalda til land og kommunu.

## Endamál:

- at skilja, hvat vælferð er
- at skilja, hvat eyðkennir norðurlendsku vælferðarskipanina
- at skilja, hvønn týdning tað hevur fyri borgararnar at liva við norðurlendsku vælferðarskipanini



*Vælferðarskipanin gevur okkum ókeypis veitingar, t.d. skúlagongd. Hugsanin aftanfyri er, at vit seinni í lívinum geva aftur til samfelagið, tá ið vit fara at gjalda skatt.*

1. Hygg at myndini og les myndatekstin. Skriva tveir setningar, ið vísa á, hvønn týdning tú heldur tað hevur fyri børn og ung, at skúlagongdin er ókeypis.

## Vælferðarsamfelag

Eitt vælferðarsamfelag tryggjar fólkunum í landinum vælferð. Orðið “vælferð” í samband við samfelagið, merkir, trygg og góð viðurskifti; eitt samfelag har ið myndugleikarnir hava ábyrgdina av sosialu trygdini og vælferðini hjá borgarunum. Hesi rættindi eru galdandi fyri øll fólk.

## Skattgjaldari

Vælferðin verður fíggjað gjøgnum skattin. At øll hava rætt til trygg viðurskifti kostar nógvar pengar. Tískil gjalda fólk skatt. Fólk, ið hava høga inntøku gjalda hægri skatt enn tey, ið hava lága inntøku.

**Vit gjalda trý sløg av skatti: Landsskatt, Kommunuskatt og Kirkjuskatt**

**Dømi:**

Landsskatturin er progressivur. Tað merkir, at skattaprosentið veksur stigvíst, tess meiri tú tjenar. Niðanfyri sært tú landsskattin, sum hann er í dag. Vit síggja, at vit kunnu tjena upp til 65.000 krónur uttan at rinda landsskatt. Hetta kalla vit botnfrádráttin hjá landinum. Síðan rinda vit eina fasta upphædd upp til eitt vist + 15 til 30% av restini, alt eftir inntøku.

| Er inntøkan (kr.) | men minni enn (kr.) | verða latnar (kr.) | av (kr.) | og av restini (%) |
|---|---|---|---|---|
| 0 | 65.000 | 0 | 0 | 0 |
| 65.000 | 235.000 | 0 | 65.000 | 15,0 |
| 235.000 | 330.000 | 25.500 | 235.000 | 20,0 |
| 330.000 | 800.000 | 44.500 | 330.000 | 25,0 |
| 800.000 | | 162.000 | 800.000 | 30,0 |

**Dømi: Kommunuskattur**

Kommunustýrini áseta á hvørjum ári, hvussu stóran part av lønini hjá borgarunum, ið tey skulu hava fyri at reka og menna kommununa. Hetta er kommunuskattur.
Í øllum kommunum kunnu vit tjena upp til 30.000 krónur skattafrítt. Hetta kalla vit botnfrádrátt. Síðan rinda vit millum 16 og 24% í skatti av restini, alt eftir, í hvørjari kommunu, vit búgva.
http://www.taks.fo/fo/borgari/skattur/hvussu-nogvan-skatt-rinda-vit/

Eisini rinda limir í fólkakirkjuni kirkjuskatt.

Landsskatt, kommunuskatt og kirkjuskatt kalla vit inntøkuskatt, og vanliga er tað henda skattin, ið meint verður við, tá ið tosað verður um skatt. Tað er eisini annar skattur, t.d. eftirlønarskattur, kapitalvinningsskattur og stuttleikaskattur, men í mun til inntøkuskattin fer hesin ikki av løn okkara, og tað eru heldur ikki øll, sum rinda henda skattin.
Men eitt, sum flestøll rinda umframt inntøkuskatt, eru almenn gjøld til eitt nú heilsutrygd, barsilsskipan, arbeiðsmarknaðareftirløn o.a.

## Týdning fyri fólkið

Vælferðarsamfelagið tryggjar, at eitt trygdarnet er undir øllum borgarum. Støk foreldur fáa barnapengar, ung lesandi fáa studning, gomul fólk fáa pensjón, og vit fáa læknahjálp uttan at gjalda fyri tað. Gerast vit arbeiðsleys, fáa vit arbeiðsloysisstuðul, so vit klára okkum, til vit fáa eitt nýtt arbeiði. Eisini veitir tað almenna hjálp, tá ið vit gerast sjúk. Tankin aftanfyri vælferðarsamfelagið er, at samfelagið virkar best, um tað almenna tryggjar okkum.

# Fakta



**Tað finnast tríggjar vælferðarskipanir:**

Norðurlendska vælferðarskipanin

- eisini kallað tann sosialdemokratiska ella almenna vælferðarskipanin

Angelsaksiska skipanin

- eisini kallað tann liberala ella amerikanska vælferðarskipanin

Miðevropeiska skipanin

- Eisini kallað tann konservativa ella týska vælferðarskipanin

**2. Hvat merkja orðini? - Set striku orð og frágreiðing**

| | |
|---|---|
| At fíggja | Korini, ein persónur er vaksin upp í |
| Sosial bakgrund | At gjalda |
| Almennar veitingar | Landið og kommunurnar |
| Skattur | Ein partur av inntøkuni, ið eitt fólk skal gjalda til landið og kommununa |
| Tað almenna | Eitt heiti, sum verður brúkt um útgjald ella stuðul, ið landið letur borgarnum sum fíggjarliga hjálp ella ískoyti |